# norskan festival





Ung sum eldri vórðu drigin av harða tónleikinum og stukku inn á gólvið at forvitnast. Summi kvikaðu sær útaftur, men summu vórðu standandi



Teir søgdu seg vera eit sirkus – og tað vóru teir eisini



Eisini Prix-vinnarin Uni Debes var í Vágsbotni og lýddi á spennandi tónleikin



Limirnir í Fólkayvirlitium kendu seg noyddar at hava bodyguards við sær á konsertini. »Tað er kalt á toppinum«, varð sagt



Niels Arge Galán úr punkbólkinum 200 var eisini millum áhoyrararnar



Serliga ungu áhoyrararnir hugnaðu sær óført. Teir vóru ógvuliga entusiastiskir, klappaðu og flentu



Nógvar kenslur vóru í tónleikinum



Tilsamans mundi talan vera um eini 100 fólk, sum leitaðu sær inn á gólvið í miðlahúsinum til konsertina flaggdagin

# ART Road-show 2005

## Framføra á Havnargøtum í summar

– Konsertin hjá Fólkayvirlit flaggdagin, var óofficiella startskotið til eitt roadshow hjá ART 2005.

– ART er Áhugafelag Rock Tónleikaranna, sum í høvuðsheitum hevur tilknýtið til ovastu hædd á Margarinfabrikkini, har venjingarhøli eru.

– Eini 15 bólkar eru í dag limir í ART.

– Og tað er ikki eitt felag uttan ætlanir. Í summar fer felagið nevniliga at hava eini 30-50 tónleikatiltøk runt um í Havnini ígjøgnum summarið. Talan verður um bólkarnar, ið eru knýttir at ART, sum fara at framføra á Havnargøtum og m.a. eisini í miðlahúsinum í Vágsbotni.

– ART fekk annars prógvað sítt virði við framúr góðum tónleikarum á AME handanini leygarkvøldið. Bæði Føroya besti bassleikari, Føroya besti guitarleikari og Føroya besti trummuleikari eru knýttir at felagnum.